Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jaspur Langgaard, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Prísbroytingar og ferðsla í Eysturoyartunlinum

Spurningar:

1. Hvussu hevur prísbroytingin hjá Eysturoyartunlinum frá 1. januar 2022 ávirkað ferðsluna?
2. Nær verður ætlanin um eina fastprísskipan á kr. 1.995 um mánaðin sett í verk?
3. Hvussu stór upphædd er latin frá landinum til lánsgjøld hjá Eysturoyartunlinum í 2021 og hvør er meting fyri tørvinum á játtan í 2022?

Viðmerkingar:

Tann 1. januar 2022 broyttust prísirnir hjá Eysturoyartunlinum.

Broytingin var fyri tey, sum koyra fleiri enn 10 túrar um mánaðin, har tað frammanundan stórt sæð ongin avsláttur var.

Avsláttarskipanin sær soleiðis út við prísi fyri hvønn einvegis túr við haldi:

1-10 túrar	75,-
11-20 túrar	65,-
21-30 túrar	40,-
31- túrar	30,-

Higartil sær tað út til at hava verið trupult at áseta rætta prísin fyri koyring í Eysturoyartunlinum, hetta at finna bestu javnvágna millum prislækkingar og meira ferðslu. Tað er kortini greitt, at verður tann besta javnvágin ikki funnin, gevur íløgan ikki hægsta samfelagsliga gagn, og landskassin fer frameftir at noyðast at játta pening til lánsgjøld.
Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 4. apríl 2022

Jaspur Langgaard